# Sælir vit frælsu ferðamenn

**Ein útferð niðan á Egg sunnavert Sørvág, er túrur, sum øll kunnu fara. Tað er lætt og gott at ganga, og túrurin er stuttur. Men komin niðan, bíðar ein sjón, sum av sonnum er verd at uppliva**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*



*Stórbært er at hyggja vestur av eggini og síggja bjørg og bláar skorar. Onkur var eitt sindur varin at byrja við, men tað gekk skjótt yvir*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Uppi á Egg:** Havið logar undir tær, og havhestarnir strúka framvið eggini so nær, at væl hevði borið til at tikið teir við stong. Ferðalagið situr á vøllinum og etur matpakka, sum vit hava havt við, og alt er bara gott.

Ein sera væl nøgdur flokkur av gongufólki, sum við ferðaleiðara eru farin av Mýrum í Sørvági tann stutta túrin niðan á Egg.

Hotel Vágar skipar fyri ymsum tiltøkum gjøgnum árið. Eitt teirra hevur seinnu árini verið útferðir ymsastaðni í Vágum. Roynt hevur verið við gongutúrum, eins og siglt hevur verið kring Tindhólm.

Eini 30 fólk munnu vit vera, sum fara úr bussinum uppi á Mýrum og ætla okkum niðan á Egg. Restin, út móti teimum 20 ella so, eru farin oman til Sørvágs, tí tey skulu sigla kring Tindhólm.

Ája, vit fara so til gongu. Ferðaleiðaran hava vit heintað í Sørvági. Hann var júst afturkomin av fjalli í Gásadali, men tað ger nú ongan mun soleiðis hjá einum, sum vanur er at ganga, at fáa hendan stutta túrin gjøgnum slætta hagan.

## Krígsøki

Hetta er krígsøki, vit ganga ígjøgnum. Ikki soleiðis at skilja, at kúlur og granatir flúgva gjøgnum luftina, men tí, at her hildu bretarnir til undir krígnum.

Nógvir betongstólpar stinga enn upp úr jørðini og minna á allar hermannabarakkirnar, sum her uppi stóðu.

– Í dag er bara ein eftir, sigur Høgni, ferðaleiðarin, og peikar við stavinum móti eini hvítari avrundaðari barakk, sum stendur vinstrumegin, har vit ganga.

Høgni er røktingarmaður her, so hann kennir hagan og seyðin, og tað sanna vit, sum líður út á túrin.

Komin niðan móti hegninum, skulu vit ígjøgnum eitt portur við eitt seyðahús, har stendur. Meðan Høgni tekur hegnið frá, standa fólk, júst sum seyður í rætt, og bíða. Minnir nágreiniliga um, tá menn fara at geva kraftfóður.

Meðan fólk ganga ígjøgnum smoguna, verður onkur varur við, at har kemur meira fólk niðan brekkuna aftan á okkum. So varð kikað, og skjótt er greitt, at tað eru nøkur teirra, sum skuldu sigla kring Tindhólm.

– So munnu tey hava hildið tað verið naka óslætt uttan fyri, verður tosað, meðan vit bíða eftir hesum fólkunum.

Tey gera skjótt av og loypa um hegnið. Tykjast ikki hava nakran trupulleika við at fáa okkum aftur, og so skjótt vit hópast, verður spurt, hvat nú er á vási.

– Nei, tað var bara tað, at báturin, tey væntaðu - og høvdu fingið at vita - at skula sigla við, kom ikki, tí hann flytir fólk um Vestmannasund, nú verkfall er. Tað gevur helst meira enn ein leigutúrur kring Tindholm, verður tosað. Í staðin var so ein útróðrarbátur úr Sørvági fingin til vega, men hann hevði ikki loyvi at taka øll við, sum upp vóru møtt. So nøkur máttu bara venda aftur.

## Ymsir torvheiðar

Vit ganga niðan gjøgnum hagan og fáa frágreiðingar um, hvussu hetta og hatta eitur. Her vóru bretarnir vanir at hava skjótivenjingar, og har lá vatnleiðingin oman til leguna á Mýrum.

Nakað uppi síggja vit eina vatnbrunn, sum bretarnir hava fingið vatn úr til allan býin á Mýrunum.

Torvheiðar hava tey havt her uppi. Eitt sindur løgið, heldur ferðaleiðarin, at tey eru farin her niðan at skera, tá nógv, gott torv var at fáa nógv nærri bygdini.

– Men tað man nokk vera tí, at teir hava lagt upp fyri fullveldinum, heldur hann skemtandi fyri, at teir hava tikið tað, sum longst er burtur fyrst, so lættari hevur verið at gingið eftir tí seinna.

Nøkur frágreiðing um, hvat tað hevði við fullveldið at gera, kom tó ongantíð.

Heldur man tað hava verið so, verður samst um, at tey, sum meira áttu, lógu nærri bygdini, meðan tey, sum minni ella einki áttu, fingu ávíst teir óhøgligu torvheiðarnar. Tað er sær sjálvum líkt.

Fólk eru farin at skilja seg burturúr. Onkur er, sum gongur skjótt, meðan onnur bara taka tað róligt. Veðrið er so vælsignað, og góð tíð er, til farast skal til borðs á hotellinum seinni á kvøldi.

Komin nakað niðan er onkur, sum finnur eitt tjaldursreiður, Og mín sann um ikki eitt egg er í.

– Tað var heppið at finna eitt egg á veg niðan á Egg, eru fók samd um.

Krossmessa var í gjár, og so verður tosða um, at gamalt er, at tjaldrið skal hava fult reiður á krossmessu, hóast ikki øll eru samd um tað.

## Minniligu bjørg

Og vit koma niðaná. Fáa at vita, at her eru tríggjar gjáir, sum vit skulu ansa eftir ikki at ganga okkum í, og eitt sindur av leysum upsum er eisini at ansa eftir. Haðar skulu vit ikki fara.

Men útsýnið her uppi er heilt ófatiliga vakurt. Norður eftir síggja vit bjørg og skorar, har seyður gongur. Bæði hagaseyður og eisini slíkur, sum sleptir verða í fitilendi.

Vit fara út á eggina og síggja, at staðið ber navnið av røttum. Her er knívhvøss egg niður fyri og beint í havið. Undir okkum standa Dunnesdrangarbir leysir úr landi, og havið er so silvurlitað, so langt eygað røkkur.

Eini tvey skip og ein minni bátur fara framvið nakað úti, og meðan vit sita og fáa okkum matpakkan, kemur flogfarið hjá Atlantsflog strúkandi framvið.

Tey eru eisini á sightseeing, er líkt til.

Eftir at hava notið útsýnið og tað, vit høvdu við, verður farið suður við eggini, soleiðis at vit síggja suður við landinum heilt at Bøsdalafossi og Trælanípuni.

Suðuri í havi liggja oyggjarnar allar. Suðuroy og Dímunar báðar. Skúvoy og Sandoy. Fyri vestan er Mykines, har drangarnir standa so klárir, leysir úr Hólminum. Ein sera vøkur sjón, sum bara ger undranina og virðingina fyri føroysku náttúruni størri.

Tað dregur eitt sindur út, men vit mugu síggja Fransaholuna kortini, áðrenn vit fara til hús, heldur ferðaleiðarin.

Hann fer út á eggina og hyggur niður í skorina undir okkum her suðuri. Har ganga eina tvær ær, sum hann vil hava uppaftur á slætt. Fer at blaka grót, og tað eydnast honum at fáa tær at venda og ganga út aftur eftir rásini og oman á slætta hagan. Men tá vóru tær tríggjar.

Fransaholan skal hava verið brúkt at goyma seg fyri sjórænarum. Bæði fólk og fæ, verður sagt.

Heldur man hetta vera eitt náttúrufyribrigdi, sum ikki hevur havt nakra uppgávu sum so, tí tá komið verður nærri holinum, kennist týðuligur trekkur ígjøgnum, so eingin ivi er um, at holið er opið út aftur longri niðri í berginum.

Tað er nú liðið nakað væl út á dagin, so vit halda leiðini aftur at húsum. Ganga mestsum somu leið, tó vit eru eitt sindur eystari á. Onkur finnur eina riflupatrón, sum bretarnir ivaleyst hava lagt eftir seg, tá teir hava havt skotvenjingar undir krígnum. Hon var tærd, so hol er á. Einki at goyma, so hon verður slept í eina tjørn og væntað verður so, at hon søkkur niður í móruna.

Hóast túrurin ikki var langur, var hann ein av teimu heilt frægu, sum avgjørt er verdur at bjóða fólki.

Ivaleyst átti ferðavinnan í Vágum at fingið onkrar avmerkingar uppi á sjálvari eggini. Eitt nú har leysa lendið er, eins og merkt eigur at verða, hvar gjáirnar eru, ein skal ansa sær fyri.



# Mánadagur 13. mai

**SVF**

- 18.25 DV í kvøld
- 18.30 Fres e
- 19.00 Miðlingurin Malcolm 12
- 19.25 Urtagarðurin verður broyttur 1:6
- 20.00 Dagur og Vika
- 20.20 Læknin hevur orðið
- 20.50 Bláa gongustjørnan 3:8 - náttúrurøð frá BBC
- 21.40 Mamma var persisk prinsessa - svensk sending
- 22.30 Krígsfelagar 3:10 - amerikonsk dramarøð - Óhóskandi fyri børn
- 23.35 Brúðarkjólin - kanadiskur stuttfilmur
- 23.45 Gev mær tað! - pólskur stuttfilmur
- 00.00 Liðugt

**EUROSPORT**

- 7.30 All Sports - Watts
- 8.00 Football - World Cup Road to
- 9.00 Football - Youth Festival Toulon
- 10.30 Football - Youth Festival Toulon
- 12.00 Tennis - WTA Tournament Rome Italy - Live
- 15.00 Cycling - Tour of Italy - Live
- 16.30 All Sports - Watts
- 17.00 Football - Youth Festival Toulon - Live
- 18.45 Football - World Cup Stories
- 19.00 Football - Youth Festival Toulon - Live
- 20.45 Football - Asian Culture Cup
- 21.00 Football - Eurogoals
- 22.00 Football - Youth Festival Toulon
- 23.00 News - Eurosportnews report
- 23.15 All Sports - Watts
- 23.45 Football - The Match of the Century
- 0.15 News - Eurosportnews report

**BBC PRIME**

- 0.00 TLZ: »A History of Britain – Beginnings«
- 1.00 TLZ: »The Human Body – Raging Teens«
- 2.00 TLZ: »Giotto – The Arena Chapel«
- 2.50 TLZ: »Ever Wondered?«
- 3.00 TLZ: »Rich Mathematical Activities«
- 3.25 TLZ: »Tales of the Expected - Coders«
- 3.30 TLZ: »Containing the Pacific«
- 4.00 TLZ: »Trouble at the Top – Carry on Caravanning«
- 4.40 TLZ: »Megamaths – Tables – Eight Times Table«
- 5.00 TLZ: »Greek Language and People – Getting Around«
- 5.30 Follow Through
- 6.00 The Story Makers
- 6.15 Step Inside
- 6.25 The Further Adventures of Superted: »Leave it to Space Beavers«
- 6.45 Playdays: »Tent Stop«
- 7.05 Blue Peter
- 7.30 Ready Steady Cook
- 8.15 House Invaders
- 8.45 Bargain Hunt
- 9.15 Violent Planet: »Inferno«
- 10.15 The Weakest Link
- 11.00 Teen English Zone
- 11.30 Great Writers of the 20th Century: »Primo Levi«
- 12.30 Bergerac: »The Waiting Game«
- 13.30 Ready Steady Cook
- 14.15 The Story Makers
- 14.30 Step Inside
- 14.40 The Further Adventures of Superted: »Leave it to Space Beavers«
- 15.00 Playdays: »Tent Stop«
- 15.20 Blue Peter
- 15.45 Martin Chuzzlewit
- 16.45 Wildlife: »Uninvited Guests«
- 17.15 Animal Hospital
- 17.45 The Weakest Link
- 18.30 Doctors
- 19.00 Eastenders
- 19.30 The Brittas Empire: »Mr Brittas falls in Love«
- 20.00 In A Land of Plenty
- 21.00 Coupling: »Inferno«
- 21.30 Parkinson: »Kevin Spacey, Judi Dench, Rory Bremner«
- 22.30 Animal Police
- 23.00 The Cops

**BBC WORLD**

- 0.00 BBC News - followed by Weather
- 0.30 Correspondent: »My Brother The Taliban Fighter« (r)
- 1.00 BBC News - followed by Weather
- 1.30 The Car's The Star (r)
- 2.00 BBC News - followed by Weather
- 2.30 Dateline London (r)
- 3.00 BBC News - followed by Weather
- 3.30 Asia Today (r)
- 3.45 Reporters (r)
- 4.00 BBC News - followed by Weather
- 4.30 HARDtalk
- 5.00 BBC News - followed by Weather
- 5.30 World Business Report
- 6.00 BBC News - followed by Weather
- 6.30 World Business Report
- 7.00 BBC News - followed by Weather
- 7.30 World Business Report
- 7.45 Sport Today
- 8.00 BBC News - followed by Weather
- 8.30 Euro Brief
- 9.00 BBC News - followed by Weather
- 9.30 HARDtalk (r)
- 10.00 BBC News - followed by Weather
- 10.30 Correspondent: »My Brother The Taliban Fighter« (r)
- 11.00 BBC News - followed by Weather
- 11.30 Asia Today
- 11.45 World Business Report
- 12.00 BBC News - followed by Weather
- 12.30 HARDtalk (r)
- 13.00 BBC News - followed by Weather
- 13.30 World Business Report
- 13.45 Sport Today
- 14.00 BBC News - followed by Weather
- 14.30 Clarkson's Car Years: »Family Car« 6: 6 (r)
- 15.00 BBC News - followed by Weather
- 15.30 Asia Today
- 16.00 BBC News
- 16.30 HARDtalk (r)
- 17.00 BBC News - followed by Weather
- 17.15 World Business Report
- 17.30 Click Online (r)
- 18.00 BBC News - followed by Weather
- 18.30 World Business Report
- 18.45 Sport Today
- 19.00 BBC News - followed by Weather
- 19.30 HARDtalk (r)
- 20.00 BBC News - followed by Weather
- 20.30 Holiday
- 21.00 BBC News - followed by Weather
- 21.30 World Business Report
- 22.00 BBC News - followed by Weather
- 22.30 Earth Report Hi-Tech Harvest
- 23.00 BBC News - followed by Weather
- 23.30 World Business Report (r)
- 23.45 Asia Today

**TV3**

- 5.00 Garfield og venner
- 5.25 Børnehjørnet
- 7.00 TV-Shop
- 8.00 Lassie på nye eventyr
- 8.25 Ricki Lake
- 9.15 Ricki Lake (G)
- 10.10 Horton-sagaen (G)
- 11.00 Horton-sagaen
- 11.50 Once & Again
- 12.45 Time of Your Life
- 13.40 Popular
- 14.35 Med på moden
- 15.05 Bette
- 15.35 Ricki Lake
- 16.30 Simpsons
- 17.00 Alle elsker Raymond
- 17.30 Vild med dig
- 18.00 Sjov og Spas
- 18.30 Blossom
- 19.00 Fear Factor
- 20.00 Mandagsbio: The Ghost and the Darkness
- 22.05 Bag Facaden (G)
- 23.05 Seinfeld
- 23.35 Simpsons (G)
- 0.05 Ti tommelfingre
- 0.35 Walker Texas Ranger
- 1.30 Ricki Lake (G)
- 2.20 Træneren
- 2.50 Træneren
- 3.20 Ti tommelfingre (G)
- 3.45 Sunset Beach
- 4.30 Godnat

**ÚF**

- 7.00 Tíðindi
- 7.05 Morgunlestur - Jónsvein Bech, prestur, lesur
- 7.15 Barnaløtan - Jonna og Kári leggja til rættis
- 7.30 Tíðindi
- 7.35 Morgunrásin - Bjarni Mohr og Hilmar Jan Hansen leggja til rættis
- 8.00 Tíðindi
- 8.03 Morgunrásin
- 9.00 Tíðindi
- 9.03 Sunnudagsløtan (e) - Jonna og Kári leggja til rættis
- 9.35 Dagsins tónar
- 9.50 Morgunlestur (e) - Jónsvein Bech, prestur, lesur
- 10.00 Tíðindi
- 10.03 Fimleikaløtan 2
- 10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm leggur til rættis
- 11.00 Tíðindi
- 11.03 Løg mær dámar (e) - 1. sending hjá Ivani Eginsson
- 11.35 Undir døgurða
- 12.00 Veðurtíðindi
- 12.02 Middagstónleikur
- 12.15 Skráin og lýsingar
- 12.20 Tíðindini
- 12.40 Døgurðatónar
- 13.00 Tónatímin
- 14.00 Spurnarkapping millum framhaldsskúlar (e) - Fyrra hálvfinala. Suni Merkistein leggur til rættis
- 15.00 Tíðindi
- 15.03 Nýtt og gott gamalt - Magnus Johannesen velur løgini
- 16.00 Tíðindi
- 16.03 15 tær bestu (e) - Heðin Arge stílar fyri
- 17.00 Tíðindi
- 17.05 Hvat nú? - Elis Poulsen skipar fyri
- 18.00 Barnaløtan (e) - Jonna og Kári leggja til rættis
- 18.25 Skráin og lýsingar
- 18.30 Tíðindini
- 19.00 Stýrivolt - Mentanarlig brúkarasending. Birgir Kruse leggur til rættis
- 19.30 Rák - Tónleikasending hjá Kim Hansen
- 20.00 Løg mær dámar - 2. sending hjá Ivani Eginsson
- 20.30 Mark - Stuttsøga eftir Hanus Kamban. Egi Dam lesur
- 21.00 Tíðindi
- 21.05 Dagsetur - Øssur Egholm leggur til rættis
- 22.00 Estudio 2000 - Tónleikasending hjá Kára Annand Berg
- 23.00 Tíðindi

**Rás 2**

- 9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
- 10.00 Leysaløtan (e) - Endursending frá fríggjadegnum - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
- 11.00 Fólk á rásini (e) - Endursending frá leygardegnum - Vagnur Michelsen prátar við Sjúrður Poulsen, uppvaksin í Skúgvi
- 12.00 Tíðindi og kunngerðir
- 12.15 Tónleikur
- 13.00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Sunneva Petersen er vertur - Send heilsanir um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
- 14.00 Lýsingar
- 14.05 Ynskiløtan (framhald)
- 15.00 Tíðindi og kunngerðir
- 15.15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
- 16.00 Tónleikur
- 18.00 Tíðindi og kunngerðir
- 18.15 Tónleikur
- 19.00 Orð á Leiðini (EvR) (e) - Endursending frá hósdegnum - Jeremias profetur - 4:12 - Zacharias Zachariassen leggur til rættis
- 19.40 Tónleikur
- 21.00 Tíðindi og kunngerðir
- 21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
- 21.30 Halleluja - Andalig tónleikasending v/ Heina Lützen og Jógvan Poulsen
- 22.30 Liðugt

**Lindin**

- 13.00 Byrjan – Dagsskráin verður lisin
- 13.05 Bankabók Trúarinnar – eftir C. H. Spurgeon
- 14.30 »Jesus og eg« barnasending v/ Stellu Zachariassen (e)
- 15.00 Bønarlinjan frá hósdegnum verður endursend
- 17.00 Bønartænastan byrjar. Tlf. 321377, tilber at senda fax nr. 321379
- 17.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
- 18.00 Bønartænastan – Biðji verður fyri bønarevnunum
- 19.00 Brot & Bitar, ørvísi tíðindasending
- 20.55 Bankabók Trúarinnar – eftir C. H. Spurgeon
- 21.00 Teldan velur tónleik fyri tilkomin
- 22.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
- 23.00 Dagsskráin fyri týsdag verður lisin
- 23.10 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
- 2:00 Møti (e)
- 3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
- 6.00 Vit gevast

## Stýrivolt
### Bløð og list

ÚF Mánakvøldið kl. 19.00

Spælt verður út við tveimum stýrvoltum á hesum sinni. Teir eru danska listakvinnan Pia Schutzmann og bókavørðurin Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð.

Pia Schutzmann, sum er grafikari og limur í Koloristerne, greiðir frá listarligum arbeiði og teknikki, nú hon sýnir fram í Listaskálanum.

Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð er bókavørður á Landsbókasavninum og er við í Útnorðurverkætlan, ið hevur til endamáls at talgilda bløð, so tey gerast betur atkomulig hjá almenninginum. Byrjað verður við elstu bløðunum, sum í Føroyum eru Færingetidende, ið fyrstu ferð komu út hin 13. mai 1852, í dag fyri 150 árum síðani. Birgir Kruse leggur »Stýrivolt« til rættis.

## Urtagarðurin verður broyttur 1:6

SVF Mánakvøldið kl. 19.25

Dreymur ella veruleiki… Urtagarðsfólk og DR-TV hava verið í sving og gjørt ein nýggjan urtagarð – uttan at eigarin veit av. Hvat munnu tey fara at halda um úrslitið?

## Mamma var persisk prinsessa

SVF Mánakvøldið kl. 21.40

– Svensk sending

Farzone varð fødd í Iran, men sum smágenta varð hon ættleidd til Svøríkis.

Øll barnaárini droymdi hon um biologisku mammu sína, og tá ið hon er vaksin, finnur hon út av, at mamman er á lívi í Iran. Hóast tær nú ikki longur tosa sama mál og hava ymiska mentan, gleðir hon seg ótrúliga nógv at møta mammuni aftur.

## Krígsfelagar 3:10

SVF Mánakvøldið kl. 22.30

– Amerikonsk røð

Danin Mikael Salomon hevur leikstjørnað hesum partinum. Nú eru tveir dagar eftir D-Dagin og amerikanska E-deildin skal taka bygdina Carentan, sum hevur stóran hernaðarligan týdning. Hertøkan verður ógvuslig, teir noyðast at berjast hús úr húsi og nógvir hermenn hava ilt við at sætta seg við ræðuleikarnar, sum kríggj hevur við sær.

### Mandagsbio:
## The Ghost and the Darkness




Í endanum av 1800 talinum, verður John Patterson sendur til Eysturafriku fyri at byggja eina jarnbreytabrúgv. John er sannførdur um, at tíðarætlanin fyri brúnna skal verða hildin, inn til ein røð av ræðuligum deyðsfallum ræðir øll á byggiplássinum. Tað vísir seg, at tvær blóðtystar leyvur standa aftanfyri drápini, og skjótt er umráði eitt slaktarí – hvørja nátt koma leyvurnar og taka menniskju. Brúgvabyggjararnir seta villdjórajagaran, Remington í starv, sum er kendur fyri mót og ekspertisu í at drepa leyvur. Remington noyðist tó skjótt at innsíggja, at dreparaleyvurnar duga væl at snúgva sær.

Leikandi: Michael Douglas, Val Kilmer, Tom Wilkinson, John Kani, Bernhard Hill, Brian McCardie, Emily Mortimer.

Leikstjórn: Stephen Hopkins.